# Bush ella Kerry?

Val er í USA í november; amerikanarar fara at velja fólk í túsundtals sessir frá sheriffum til guvernørar og frá tingfólki í statunum til forsetan fyri alt amerikanska samveldið

TINGHELLUANALYSAN
*Kári á Rógvi*
*kar@faroe-law.fo*



"Eg atkvøddi faktiskt fyri teimum $87 milliardum, áðrenn eg atkvøddi ímóti... hatta er eitt fløkt mál." Hesi orðini hjá John Kerry tykjast nærum fara at kosta honum valið í heyst.

Kerry royndi at greiða frá, hví hann atkvøddi ímóti eini játtan til amerikanska stríðið í Iraq. Rætt er, at málið er fløkt, tí amerikanskir tingmenn atkvøða ikki bara fyri ella ímóti uppskotum frá fyrisitingini, alt eftir hvat flokkur teirra sigur. Sum senatorur var Kerry ikki nøgdur við allar ásetingar í hesi játtanarlóg og atkvøddi tí ímóti við síðstu viðgerð í tinginum.

Men, hvussu greiður tú túsundtals herfólki og milliónum av skyldfólki og kenningum hjá teimum frá, at tú atkvøddi ímóti at játta pengar til millum annað skottryggar vestar?

### Føddur við silvurfóti í kjafti

George W. Bush er ikki tann mest upplagdi forsetin. Amerikanska samveldið hevur fostrað ótaldar vísindamenn, leiðarar og tingfólk. Tað skuldi ikki skorta uppá evni at staðið á odda fyri teimum øllum somlum. Hví vísa kanningar (fylg við á t.d. www.c-span.org), at meirilutin í umleið 30 statum aftur vil hava henda mannin til forseta? Henda mannin, sum tosar eingilskt nakað sum Lasse Klein kundi ørkymla við sínum málblómum, og sum virkar at hava arvað valdið, men ikki evnini, frá pápanum og abbanum?

Tað er ikki sørt av "alment starv, fer tá í arv" yvir George W. Bush, sonur George H. W. Bush. Fyrrverandi løgmaðurin í landinum Texas, Ann Roberts segði um tann ikki so tungusnilda George: "Poor George, he was born with a silver foot in his mouth." Hon meinti, at hann var føddur við rættindum framíhjá, men tosar sum ein - sum amerikanarar siga - ið hevur fótin í kjaftinum.

Men, hvat hendi? George W. Bush vann og gjørdist guvernørur í Texas. Hesin forkelaði babbasadrongur við knúti á tunguni megnaði at vinna í statinum hjá Lyndon B. Johnson, har sjálvt tey deyðu plagdu at atkvøða fyri demokratunum, enntá í stríði við vælumtóktan, sitandi kvinnuligan løgmann.

Hetta sigur ikki sørt um tann góða W. Sjálvur sigur hann, at sum sonur pápa sín arvaði hann helvtina av vinunum og allar fíggindarnar hjá 41. forsetanum. At hann sjálvur gjørdist 43. forsetin er fyri stóran part tí hann altíð er undirmettur, og tí spindoktarin Karl Rove, altíð syrgir fyri frammanundan at gera Bush til "the underdog," tann vanliga mannin, sum sjálvur hevur roynt at vera í vinnuni, men sum ikki dugir øll tey somu fínu og fronsku orðini sum teir vinstrahallu nørdarnir, sum stilla upp fyri demokratarnar.

Í blaðnum The Atlantic (fæst til keyps hjá P.A. Restorffs) skrivaðu tey um júst kjakið ímillum Bush og Ann Roberts. Meðan Roberts tosaði sum rættur politikari við ótaldum fyrivarnum og nógvum sjálvrósi, helt yngri Bush seg til nøkur fá, greið vallyfti um skúlar, skatt og skaðaendurgjald.

Bush er væl útbúgvin og gløggur aftanfyri tunguballið, og er í roynd og veru nógv dugnaligari enn summi vilja halda.

### Valstríðið

At valstríðið er ørðvísi í USA enn í Føroyum sæst uppá mangar mátar. John Kerry takkaði fyri at vera vorðin kosin demokratiskt valevni umgyrdur av vápnafeløgum úr Vietnam. Kerry vildi bæði vísa á, at hann hevur verið djarvari enn Bush, ið ongantíð var í Vietnam, og at hann samstundis hvørki er ræddur fyri ella ímóti at føra kríggið í Iraq til endans.

Síðani hevur Kerry ferðast runt hetta stóra samveldið við 50 limalondum. Hann hevur talað við skúlar og brandstøðir, ítróttarvallir og fundarstøð. Kerry er bæði klókur og djarvur, hevur sera drúgvar royndir á tingi, er útbúgvin lógkønur og hevur virkað sum advokatur.

Áðrenn Kerry gjørdist valevnið hjá demokratiska flokkinum, noyddist hann tó at stríðast ímóti fleiri øðrum í uppstillingarvalinum hjá flokkinum. Serliga Howard Dean lá leingi væl fyri, men mátti at enda lúta. Dean er fyrrverandi guvernørur í Vermont og er eftir amerikanskum viðurskiftum rættiliga vinstravendur og er harliga ímóti krígnum í Iraq. Hetta noyddi Kerry at royna at tekkjast veljarunum longur úti til vinstru. Tað hevnir seg nú, tí republikanararnir siga Kerry ikki bara vera vinstravendan, men serliga at Kerry broytir støðu í heilum.



*Avbjóðararnir*

*Mynd: Reuters*

Ein felagskapur hevur goldið fyri lýsingar, sum vísa Kerry sum windsurfara (tað er hann), sum broytir kós alt eftir, hvussu politiski vindurin blæsur. Annar felagskapur við fyrrverandi Vietnam-hermonnum hevur ákært Kerry fyri at vera óheiðurligan, siga at hann hevði ikki uppiborðið heiðursmerki síni, og kalla tað landasvik, at Kerry í síni tíð lat frá sær heiðursbondini at mótmæla krígnum í Vietnam.

Júst slíkar herferðir merkja valstríðið. Felagskapir á báðum veingjum savna inn pengar at leypa á tað valevnið, sum teir eru ímóti. Tann herda lóggávan hevur gjørt tað trupult at lata valevnunum nógvar pengar. Mark er sett fyri, hvussu nógv fólk kunnu lata í beinleiðis stuðli, nøvnini vera almannakunngjørd, og mark er fyri, hvussu nógv valevnini kunnu brúka av pengum. Men felagsskapir fáa brúkt óavmarkaðar pengar, um teir bert siga seg vilja føra fram ávís sjónarmið uttan beinleiðis at stuðla nøkrum valevni.

Kerry hevur sínar stuðlar millum listafólk, fakfeløg, vinstravend og býarfólk. Bush fær serliga kristna høgravongin, vinnulív, fólk í forstaðum og á bygd at stuðla sær. Valstríðið er merkt av, at valevnini royna at fáa stuðul frá týðandi persónum og felagskapum. Mangir felagsskapir, alt frá fakfeløgum og vinnufelagskapum til universitet og studentafeløg stuðla alment ella nærum alment ávísum valevnum.

Amerikanarar velja í veruleikanum ikki ein persón at stýra øllum samveldinum. Teir velja ímillum tvær stórar samgongur. Við at hyggja at, hvør stuðlar hvørjum av forsetaevnunum ber til at síggja, hvussu politikkurin hjá teimum fer at vera, og hvønn teir fara at tilnevnna. Valdið hjá forsetanum liggur fyri stóran part í at tilnevna ella skjóta upp túsundtals embætisfólk, stjórnarlimir, stjórar, stýrislimir, dómarar og onnur í størv og sessir. Tað er millum annað tí, at áhugafelagsskapir gera nógv fyri at fáa sínar veljarar á val, fyri at fáa ávirkan seinni; valstríðið er tí fyri stóran part beinleiðis roynd hjá bólkum og felagskapum at fáa lyfti frá valevnum og síðani at fáa limirnar allar at stemma uppá tað eina valevnið.

Sum dømi kunnu vit nevna teir mongu veljararnar á sonevnda kristna høgraveinginum, sum ma. vilja hava almennan stuðul til kristnar skúlar og berjast ímóti fosturtøku. Hesi skipaðu seg longu í 1970'unum og vóru við til at velja Reagan eins og at fella eldra Bush.

### Kríggj og orðaskifti

Tann eldri George Bush tapti valið í 1992, sjálvt um hann júst tá hevði vunnið fyrra golfkríggið og rikið Saddam Hussein úr Kuwait uttan stórvegis tap. So tað var at væntað, um yngri Bush eisini tapti eftir at vera komin at standa fastur í mesopotanska sandinum og eftir at hava mist fleiri enn 1.000 herfólk. Men munurin tykist vera, at amerikanarar stuðla forsetanum meðan landið enn er í kríggi.

Nýliga talaðu bæði Bush og Kerry fyri felagnum hjá the National Guards, herfólki hjá einstøku statunum. Bush talaði um frælsi, dyrvi og týdningin hjá familjunum, ið heima sita. Kerry afturímóti leyp á forsetan fyri ikki at hava tryggjað sær undirtøku frá øðrum londum, fyri at dylja fyri fólkinum, og fyri ikki at duga at sleppa úr aftur stríðnum. Hóast Kerry sjálvur er tann royndi hermaðurin, fekk hann verri enn somu undirtøkuna.

Kerry royndi fyrstu tíðina eftir at vera vorðin almenna valevnið hjá demokratunum at fáa innlendismál á dagskránna, men tað eyndaðist ikki. Nú roynir hann at leypa á Bush fyri hurlivasan í Iraq. Men Bush hevur klárað seg so væl í valstríðnum, at sjálvt New Jersey, ið bert hevur atkvøtt fyri republikanara í nýggjari tíð, tá Reagan var afturvaldur, er vorðin stríðsvøllur. Republikanska floksráðstevnan í New York hevur økt talið av republikanskum atkvøðum bæði í New York og lítla grannastatinum New Jersey. Har er fyrrverandi borgmeistarin í New York Býi, Rudolph Guiliani, sera væl umtóktur, og ráðandi demokratarnir eru tengdir at fleiri gølum.

Við einans um 5 prosentum av arbeiðsloysi, við sera trúgvum stuðlum, við at halda týðandi vallyfti um útbúgving og skatt, við áhaldandi kríggi móti yvirgangi (óvist er jú nær kríggj ímóti einum hugtaki endar), er trupult at koppa sitandi forsetanum.

Skal nakað broyta gongdini, so má tað vera beinleiðis orðaskifti millum valevnini. Hetta átti at verið styrkin hjá Kerry, ið so mangan hevur vunnið orðaskifti í heimstati sínum. Men fyrsta debattin vísti, at forsetin dugir at knýta seg til sínar mest týðandi stuðlar og at vera tann greiði og einfaldi (hóast mismaltur). Kerry roynit at greiða frá støðu síni, men hon oftani at vera skiftandi, torgreidd og heldur lunkað. Hjá Bush er vanliga ongin slingur í valsinum. Hann krympar eyguni saman og hyggur beint inn í kameraið: "tað er onki fløkt mál at stuðla okkara monnum og kvinnum í Iraq, antin stuðlar tú teimum ella ikki!"

Amerikanska valstríðið er í øllum førum eitt stríð millum ymsar kreftir.



# Summir svinga meira enn aðrir

Av teimum fimmti statunum í USA verða atkvøðurnar í 22 teirra avgerandi fyri, hvør fer at vinna forsetavalið 2. november

FORSETAVAL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Í Føroyum hevur seinnu árini dúgliga verið tosað um eina politiska polarisering. Sambandloysing ásin í føroyskum politikki hevur munin móti góðu gomlu høgra-vinstra ásini. Men tað er lítið av miklum, tá hugsað verður um USA. Har ert tú demokratur ella republikanari. Tú ert entin reyður ella bláur. Eins og nakrar føroyskar bygdir og nakrir føroyskir býir hava lyndi til at velja somu flokkar og kanska somu fólk val eftir val, so sæst aftur ein munandi meira ógvusligt mynstur í USA. Í USA er forsetavalið í roynd og veru eitt val millum tvey valevni. Hetta gevur av sær sjálvum eina polarisering. Í USA eru tó fleiri statir, sum í roynd og veru eru púrt einki spennandi í valdystinum. Teir verða roknaðir sum entin republikanskir ella demokratiskir. Tað er heldur ikki so løgið, um hugt verður eftir úrslitinum seinastu ferðirnar. Har er munurin millum høvuðsvalevnini í nógvum av statunum millum 25 og 30% - og heilt upp í 40 og 70%.. Teirra millum eru statir sum New York og Texas. Tá Bush vitjar í New York er tað meira fyri at savna pengar og stuðlar enn fyri at fáa atkvøður. Meðan Gore valla gjørdi sær teir stóru tankarnar um Texas fyri fýra árum síðani.

Avgerandi verða teir sokallaðu Swing states. Hesir eru teir statirnir, sum søguliga hava lyndi til skifta millum republikanska og demokratiska valevni. Aðrastaðni á síðuni sæst ein talva yvir Swing states.

Forsetavalevnini skulu so gera upp við seg sjálvi um, hvar teir skulu føra teirra valdyst. Valið verður 2. november, og tað er altavgerandi fyri valevnini, hvussu teir býta sína tíð út á statirnar.

Àhugavert er, at øll eru greið um, hvønn týdning hesir góðu Swing states hava. Á fleiri heimasíðan fyri Bush ella Kerry, verður heitt á fólk í teimum tryggu statunum um at fara til ein Swing state fyri at stuðla ella senda pengar.

### Valmenn

Kjarnin í øllum hesum er amerikanska valskipanin. Eitt amerikanskt forsetaval er ikki eitt stórt landsval, men fimmti ymisk. Hvør statur hevur eitt ávíst tal av electoral votes ella valmonnum. Ì alt eru 538 electoral votes. Vinnarin í hvørjum stati fær allar electoral votes hjá statinum. Eitt nú fekk Al Gore fleiri atvkvøður til seinasta val enn George Bush, men sitandi amerikanski forsetin hevði fleiri electoral votes í sínum parti.

### Kerry tørvar 10

Skal John Kerry gera sær nakra vón um at gerast amerikanskur forseti, so skal hann fyrst av øllum vinna valið í øllum teimum "demokratisku" statunum, har tað verður roknað við, at hann vinnur. Tað rokna teir flestu eygleiðarnir og valserfrøðingarnir eisini. Harumframt skal Kerry eisini vinna teir "Swing states", sum Al Gore vann seinast. Men tað er ikki nóg mikið. Al Gore var bert fýra electoral votes frá at gerast amerikanskur forseti, men broytingin í fólkatalinum í teimum ymsu amerikonsku statunum ger, at Kerry nýtist tíggju electoral votes fyri at vinna - treytað av, at hann vinnur í somu statum sum Al Gore ella vinnur tilsvarandi electoral votes. I skrivandi stund benda veljarakanningar á, at tað verður í statum sum: Colorado, New Mexico, West Virginia, Pennsylvania og ikki minst Florida, at tað verður avgjørt, hvør verður amerikanskur forseti komandi fýra árini.

| Statur | Valmenn | Munur í 2000 |
|---|---|---|
| Arizona (GB) | 10 | 6,29% |
| Arkansas (GB) | 6 | 5,45% |
| Colorado (GB) | 9 | 8,36% |
| Florida (GB) | 27 | 0,01% |
| Iowa (AG) | 7 | 0,32% |
| Louisiana (GB) | 9 | 7,67% |
| Maine (AG) | 4 | 5,14% |
| Michigan (AG) | 17 | 2,41% |
| Minnesota (AG) | 10 | 2,41% |
| Missouri (GB) | 11 | 3,34% |
| Nevada (GB) | 5 | 3,54% |
| New Hampshire (GB) | 4 | 1,27% |
| New Mexico (AG) | 5 | 0,06% |
| North Carolina (GB)* | 13 | 12,83% |
| Ohio (GB) | 20 | 3,51% |
| Oregon (AG) | 7 | 0,44% |
| Pennsylvania (AG) | 21 | 4,17% |
| Tennessee (GB) | 11 | 3,87% |
| Virginia (GB) | 13 | 8,03% |
| Washington (AG) | 11 | 5,58% |
| West Virginia (GB) | 5 | 6,33% |
| Wisconsin (AG) | 10 | 0,22% |
| | 235 | |

*Vanliga ein replublikanskur statur, men er tikin við tí John Edwards er senatorur í North Carolina.

*Yvirlit yvir Swing States. Ì klombrum sæst, hvør vann í 2000. GB=George Bush og AG=Al Gore. Munurin er millum tey bæði høvuðsvalevnini. Í 2000 stillaður Nader og Buchanen eisini upp, men fingu ikki nevnivert av atkvøðum í hesum sambandinum*

# Sjónvarpskjakið avgerandi

Amerikanski veljarin nýtir nógva tíð framman fyri sjónvarpskíggjanum, og tískil verður amerikanska forsetavalið eisini avgjørt á skíggjanum

FORSETAVAL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Amerikanski valdysturin er rættiliga serstakur. Sum nevnt í aðrastaðni í Tinghelluni, eru fleiri størri herferðirnar ímóti tí eina valevninum.

Lýsingaherferðirnar eru serliga at síggja í teimum sokallaðu Swing states, sum verða umrøddir aðrastaðni á síðuni. Tað er har, at lýsingarnar veruliga gera ein mun.

Lýsingarnar, sum serliga eru at síggja í sjónvarpi, eru bæði frá flokkunum sjálvum, men í alstórum mun eisini frá ymsum felagsskapum. Passivi sjónvarpshyggjarin verður væl fórðaður vikurnar undan forsetavalinum.



*Beinleiðis kjakið millum valevni í sjónvarpi verður væntandi avgerandi fyri, hvussu úrslitið av amerikanska forsetavalinum verður*

*Mynd: Reuters*

### Beinleiðis kjak

Av øllum sjónvarpsvalstríðnum verður beinleiðis kjakið millum valevnini mettt sum tað týdningarmesta.

Forsetavalevnin dystast tríggjar ferðir í beinleiðis kjaki í amerikonskum sjónvarpi, og varaforsetaevnini sleppa eisini eina ferð at standa fyri skotum framman fyri myndatólunum. Tað fyrsta kjakið var hóskvøldið - amerikanska tíð. Næstu 12 dagirnir verða so tey írestandi umførini av sjónvarpskjakinum. Irak kríggið og uttanríkispolitikkur vóru á dagsskránni í fyrsta umfarinum og teljast eisini millum avgerandi lutirnar í valstríðnum. Í teimum næstu umførini verður borað djúpri í onnur evni. Hyggjaratalið kann lættliga sníkja seg upp á hundraðtals milliónir.

Báðir partar ásannað tann stóra týdning, ið sjónvarpskjakið hevur. So stóran týdning, at tað kann verða avgerandi fyri valið.

Í skrivandi stund hevur Bush fatur á rætta endanum í veljarakanningunum. Og tískil stendur nógv á Kerry. Hann hevur alt at vinna í sjónvarpskjakinum. Eygleiðarar í fleiri stórum amerikonskum bløðum meta, at tað er her, at Kerry noyðist at klára seg væl. Fólk kenna Bush, og hvat hann stendur fyri, men nú skal Kerry vísa, hvat hann hevur at bjóða.

### Reka fólk á val

Umframt at nýta sjónvarpsmiðilin royna flokkarnir eisini at ávirka fólk sum best á annan hátt. Í hvørjum býi verða valkontór sett á stovn, har sjálvboðin royna at fáa boðskapin hjá teirra valevni fram. Hetta verður ofta gjørt við at ringja til fólk. Mett verður, at hetta eisini gevur góð úrslit. Eisini ymsir felagsskapir og áhugabólkar nýta hendan hátt fyri at fólk at velja teirra valevni. Ein rættiliga stórur partur av amerikonsku veljarunum verða roknaðir sum sofaveljarar.

Fyri at fara á val, skalt tú sjálvandi hava valrætt, men tú skalt eisini skrásetast. Hetta er ein avgreiðslu spurningur, men tað eru ikki øll, sum lata seg skráseta sum veljarar. Valluttøkan er langt frá tann sami sum í Føroyum, og tískil hevur tað risastóran týdning, hvussu nógv fólk fáast á val.